# Jógvan Róin 75 ár



Í dag, 2. oktober, verður Jógvan Róin, fyrrverandi yvirlækni, í Hoyvík 75 ár.

Jógvan Róin er ættaður úr Fuglafirði. Hann er triður í røðini av átta systkjum, elstur er hann av trimum brøðrum, og fimm vóru systrarnar.

Jógvan er sonur Lutheriu og Jákup Frants Róin.

Jógvan gekk barnaárini í skúla í Fuglafirði. Hann fór til Havnar í preliminerskúla og seinni á studentaskúla, sum var rættuliga sjáldsamt tá á døgum. Hann tók studentsprógv í 1946.

Eftir lokið studentsprógv fór Jógvan Róin til Keypmannahavnar at lesa til lækna, og eftir loknan lestur fór hann at starvast sum lækni, fyrst í Keypmannahavn, síðani eitt skifti í Føroyum, 1960-63, og síðani í Odense.

Hann gjørdist serlækni í »internum medisini«, og í 1970 bleiv hann yvirlækni í Lemvig.

Í 1973 flutti Jógvan Róin heim til Føroya, og hann tók við sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, har hann starvaðist til hann legði frá sær fyri aldur.

Men hóast hann nú er farin átta ár framvið pensjónsaldrinum, so hava øll hesi árini verið boð eftir honum. Hann starvaðist eina tíð í Noreg og Svøríki beint eftir, at hann legði frá sær, men síðani hevur hann fleiri ferðir hjálpt til, bæði á Landssjúkrahúsinum og í Klaksvík, eins og hann eisini í fleiri skiftum hevur undirvíst á Sjúkrasystraskúlanum.

Í lestrartíðini í Keypmannahavn hitti Jógvan konuna, Lill. Hon var sjúkrasystir, og giftust tey í 1951. Tey fingu fimm børn, Bjørg, Ásu, Frants, Ruth og Andrass.

Lill doyði í 1986, 59 ára gomul.

Jógvan Róin gjørdist landskendur í Føroyum, tá hann veturin 1960/61 hevði sendingarnar »læknin hevur orðið« í Útvarpi Føroya. Hesa sendingina hevði hann, til hann fór av landinum aftur í 1963, og hann tók táttin uppaftur, tá hann kom aftur í 1973.

Í Danmark gjørdist hann eisini landskendur, tá hann vísti dirvi eftir eina tokvanlukku á Fyn. Samrøður vóru við hann í fleiri bløðum og sjónvarpi, tí hann hevði gjørt so stóran innsats á vanlukkustaðnum.

Um Jógvan má eisini sigast, at hann hevur »grønar fingrar«. Í urtagarðinum í Hoyvík hevur hann bæði epli, blommkál, broccoli o. a. m. Í heimbygdini, Fuglafirði, hevur hann bæði seyð og bát.

Jógvan hevur gjørt nógv fyri sukursjúkusjúklingar í Føroyum, og hann er framvegis aktivur limur í Diabetisfelagnum.

Í 1986 skipaði hann fyri stórari læknaráðstevnu – við fleiri hundrað luttakarum – í Føroyum, tá fremstu serfrøðingar úr øllum heiminum hittust til stevnu í Norðurlandahúsinum.

Jógvan býr saman við Malvinu á Dunga í heiminum í Hoyvík.

Føðingardagin heldur hann saman við familjuni.



*Familjan hjá Eileri Jacobsen avmyndað í Skagen, tá Fríðborg og Sólvá fóru av bakkastokki. Karstens-feðgarnir t. v. Umframt brøðurnar við familju eru Palli Johannesen í Vestmanna við konu og børnum til staðar hendan dupulta hártíðardag. Elspa og Hjørdis standa høgrumegin*

# Skálvíksdrongurin sum gjørdist sildarkongurin

**Eiler Jacobsen, reiðari, hevur givið út annað bindið av endurminningum sínum. Triða bindið kemur næsta ár**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Nú um dagarnar kemur út annað bindið av endurminningunum hjá Eileri Jacobsen, »Skálvíksdrongur sildakongur«, út. Bókin verður send teimum, sum í fjør keyptu fyrsta bindið.

Hendan bókin ber undirheitið »Á sløttum sum í brøttum« og fevnir um tað sera umskiftandi tíðina frá 1968 til 1986.

Hetta tíðarbilið byrjaði við, at norðhavssildin hvarv, samstundis sum toskafiskiskapur okkara í Grønlandi minkaði í stórum, so føroyingar stardu eina lemjandi kreppu beint í eyguni.

Men ístaðin fyri kreppu fingu vit eitt hitt mesta vakstrarsekið í nýggjaru søgu okkara, tá føroyski fiskimenn brutu nýggjar slóðir, teirra millum skiparin úr Skálavík, sum júst hevði latið fyrstu Sólborg byggja.

Hon og onnur nótarskip glúpaðu so nógv »gull« úr Norðsjónum, at løgtingið helt tað í 1970 vera neyðugt at broyta skattalógina, sum Eiler fekk skyldina fyri.

Norðborg royndist so væl, at hon man eiga met í støðugari manning, og Krúnborg skaraði í fleiri ár framúr sum besta nótarskip í Norðsjónum.

Summi stúrdu og onnur skeldaðu, tá Eiler sjálvur annar á lítlum glastrevjabáti í trý samdøgur millum Noreg og Hetland bardist fyri lívinum í himmalsins ódnarveðri.

Tá triðingurin av føroyska útflutningsvirðinum seinna part av 70-árunum var skírt »Norðsjóvarlygnin«, umboðaði Eiler tey 18 nótar- og 28 ídnaðarskipini í orrustuni til valið í 1978, sum mundi vera eitt hitt beiskasta valstríðið í nýggjari tíð.

Eftir at øll londu høvdu flutt fiskimørkini út á 200 fjórðingar, bleiv tað strævnari hjá okkara minkandi nótar- og ítnaðarflota at lívbjarga sær. Men tá hevði Eiler spjatt sín váða við at lata »reyðu« Sólborg byggja til rækjufiskiskap. Tað var tá vinna við vandum vinningi.

Tá nótarflotin hevði tað stríggið fyrra part av 80-árunum, skein Sólborg sum ein sól og skuplaði saman við øðrum rækjuskipum pening inn til manningar go eigarar, til land og fólk.

Men tvær ferðir brann Sólborg og einaferð Krúnborg, so dramatikki var ovmikið av. Men tað ber itl at venda óhappi til møguleika, so at vanlukka roynist signing.

Tá Eiler seldi »reyðu« Sólborg til Grønlands í 1986 fyri tvær ferðir byggiprísin á skipinum, stóð hann á einari av sínum lívs tindum, hámettur av summum og øvundaður av øðrum.

Hetta annað bindið av Skálvískdrongi Sildarkongi er nærum 400 blaðsíður í vavi við nærum líka nógvum myndum, 100-tals persónsnøvnum og nógvum spennandi avdúkingum um eitt hendingaríkt lív hjá einum av okkara mest litføgru núlivandi vinnulívsmonnum.

»Á sløttum sum í brøttum« verður ikki, sum upprunaliga ætlað, seinasta bind av endurminningum Eilers. Eitt triðja bind kemur nevniliga í næsta ár, sum snýr seg um tíðarskeiðið frá 1986 upp til nútíðina.

Eins og bind I kostar bind II 190 kr. Henda bókin fæst heldur ikki í bókabúðunum, men bert við at tekna seg fyri henni á Posthúsinum.



*Tað var ein hátíðardagur, tá Eiler og Beinta, við lítlu Hjørdis og Sámali, stóðu á brúnni á Sólborg, fyrsta skipi, Eiler átti sjálvur, 38 ára gamal*



# Uttanríkispolitkkkurin skal flytast til Føroya

**Føroyar og Grønland skulu sjálvi taka allar avgerðir í uttanríkispolitiskum viðurskiftum, sum einans viðvíkja teimum báðum londunum. Uttanríkispolitikkurin skal flytast úr danska Uttanríkisráðnum til landsstýrini í Grønlandi og Føroyum. Nýggir tónar frá danska forsætisráðharranum í setanarrøðuni, hann helt í Fólkatinginum í gjár**

SETANARRØÐA
*Magnus Dam*
*Christiansborg*



*– Stjórnin er sinnað at umrøða eina skipan, sum ber í sær, at føroysku og grønlendsku landsstýrini fáa heimild at taka avgerðir vegna ríkið í millumlanda viðurskiftum, sum einans víðvíkja Føroyum og Grønlandi, segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri í fyrstu setanarrøðu síni, tá Fólkatingið varð sett á middegi í gjár, týsdagin. Anfinn Kallsberg, løgmaður og Edmund Joensen, løgtingsformaður vóru til staðar, tá tingið varð sett*

Danska stjórnin er sinnað at eftirlíka føroysku og grønlendsku ynskjunum um størri ávirkan á síni egnu uttanríkispolitikisku viðurskifti.

Mál, sum bert viðvíkja Føroyum og Grønlandi, skulu ikki til Danmarkar at venda, áðrenn endaligu avgerðirnar verða tiknar. Føroyar og Grønland skulu hava myndugleika at taka allar slíkar avgerðir heima hjá sær sjálvum. Uttan at danir leggja seg útí viðurskiftini.

Hesum boðadi danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, frá, tá Fólkatingið vard sett í gjár. Bæði Føroyar og Grønland vilja sleppa at spæla ein størri leiklut á uttanríkispolitiska økinum, vísti forsætisráðharrin á. Og hóast heimastýrislógin ásetur, at danir umsita uttanríkispolitikkin vegna alt ríkið, so skal hetta ikki vera nøkur forðing, segði Forsætisráðharrin í setanarrøðuni í gjár.

## Lóggeva fyri broytingunum

Danska stjórnin er sinnað at lóggeva, so málsræðið verður flutt úr Keypmannahavn til Føroya og Grønlands.

– Stjórnin er sinnað at umrøða eina skipan, sum ber í sær, at føroysku og grønlendsku landsstýrini fáa heimild at taka avgerðir vegna ríkið í millumlanda viðurskiftum, sum einans víðvíkja Føroyum og Grønlandi.

– Ein tílik heimild liggur uttanfyri heimastýrislógirnar, men stjórnin er sinnað at lóggeva, so føroysku og grønlendsku landsstýrini fáa eina tílíka heimild, segði forsætisráðharrin frá Fólkatingsins røðarapalli.

Talan er um eina stóra broyting í mun til tær mannagongdir, sum eru galdandi í dag. Í dag kunnu Føroyar og Grønland ikki av sínum eintingum gera sáttmálar – um eitt nú fiskivinnurættindi – við onnur lond. Danska Uttanríkisráðið er altíð umboðað í millumlanda samráðingum og skal geva sítt endaliga loyvi.

Tað hevur eisini mangan verið frammi, at Danmark hevur ilt við at røkja føroysk áhugamál, tí Danmark er limur í ES, og tað eru Føroyar ikki. Tað ber ikki til at røkja áhugamálini hjá bæði Føroyum og ES, tá ið ES hevur eina aðra almenna støðu enn Føroyar í ávísum málum, eitt nú viðvíkjandi hvalaveiðu.

Hvussu umfatandi broyting, talan verður um, er ógreitt enn, tí forsætisráðharrin leggur upp til, at hetta er ein samráðingarspurningur millum Føroyar, Grønland og Danmark.

## Menna sjálvstýrið – í ríkinum

Anders Fogh Rasmussen heldur tað vera náttúrligt, at Føroyar og Grønland vilja hava størri ávirkan á egin viðurskifti.

– Tað liggur nakað grundleggjandi sunt í, at avgerðir verða tiknar so nær teimum fólkunum, sum avgerðirnar viðvíkja, sigur hann. Stjórnin styðjar tí einari gongd, sum ber í sær, at Føroyar og Grønland yvirtaka ábyrgdina av so nógvum uppgávum sum gjørligt, leggur hann afturat.

Forsætisráðharrin vísir á, at samráðingar í løtuni eru millum stjórnina og landsstýrið um at yvirtaka løgreglu- og rættarskipanina, familjurættin, fólkakirkjuna, útlendingaøkið og málsøki á vinnurættarliga økinum.

Hesa gongdina tykist danski forsætisráðharrin at vera væl nøgdur við. Fyri tað fyrsta, tí hetta er tað, føroyska landsstýrið ynskir og í øðrum lagi, tí hesar samráðingar liggja innanfyri karmarnar í Ríkisfelagskapinum.

Og í Ríkisfelagsskapinum vil danski forsætisráðharrin varðveita Føroyar og Grønland, samstundis sum hann er sinnaður at endurnýggja felagsskapin millum tey trý londini.

## Fyrimunir í ríkinum

– Føroyska heimastýrið hevur virkað í meira enn hálva øld, tað grønlendska í kvarta øld. Tíðin er komin til broytingar. Tíðin er komin til at endurnýggja heimastýrisskipanirnar, heldur Anders Fogh Rasmussen.

– Men allar broytingar, sum verða gjørdar, eiga at fara fram innanfyri Ríkisfelagsskapin, leggur hann afturat.

– Stjórnin heldur, at tað er ein fyrimunur, um gongdin móti øktum sjálvstýri fer fram innanfyri karmarnar í Ríkisfelagsskapinum. Tað eru so sterk bond millum Grønland, Føroyar og Danmark, at tað er náttúrligt hjá okkum at standa saman og hjálpa hvør øðrum, segði forsætisráðharrin, sum tó undirstrikar, at endaliga avgerðin um framtídarstøðuna liggur hjá føroyska og grønlendska fólkinum.

Hetta seinna er ein endurtøka av støðuni, sum danska stjórnin hevur haft seinastu mongu árini, men í samband við uttanríkispolitikkin er talan um nýggjar tónar frá danska forsætisráðharranum.


